


*Torkil Mørkøre hevði lagt framførsluna væl til rættis og var deiliga friðarligur, aftaná villari bólkarnar seinnapartin leygardagin*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Torkil er hugnaligur

**Tað var ikki ætlanin at Torkil Mørkøre skuldi spæla á Fjarðafestivalinum, men hann var í øllum førum vælkomin**

UMMÆLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fitt av fólkið var komið saman til konsertina hjá Torkili Mørkøre á Fjarðafestivalinum 2008. Tey fyrstu, ið komu inn vóru skjót at seta seg á stólarnar í salinum, so tað sást at ein friðarlig konsert var á veg.

Við Torkili á pallinum vóru fimm Klaksvíkingar, Kristoffur Mørkøre, Høgni Klakkstein, Jóan Petur Hansen, Mikkjal Hvannastein og Leivur Vitalis. Allir hava spælt nógv í andaliga tónleikaumhvørvinum í Føroyum, so talan var um royndar menn.

Framførslan var eisini hareftir, teir spældu væl, hóast teir ikki hava verið nógv samlaðir áðrenn konsertina. Fjøldin var trygg leidd gjøgnum framførsluna, og ongin slingur var í valsinum.

Sum heild høvdu teir skipað seg væl, so tónleikurin var borin fram á besta hátt.

Tað var eisini deiligt, at fyrireikararnir høvdu lagt skránna soleiðis til rættis at Torkil Mørkøre kundi fáa fólkið niður á jørðina aftur, aftaná ein heilan seinnapart við flúgvandi, buldrandi rokki.

Torkil Mørkøre hevði heilt stóran tokka millum fólkið heilt frá byrjan, og tað kann hugsast, at hetta er tí hann hevur, so ella so, framført á festivalinum hvørja ferð.

Ætlanin var at seinasta lagið skuldi vera »Can the World see Jesus«, sum var á fløguni hjá Torkili, men hann var klappaður upp aftur á pallin, men av tí hann onki eykalag hevði framførdi hann »Vilji tín« einaferð enn.

Øgiliga lekkurt at ein maður við einum hitti, ikki goymir hetta til eykalag, á sama hátt sum nógvir bólkar gjøgnum tíðina hava gjørt.

---

# Sálmarnir og Fjallaprædikan

**Helgi Abrahamsen bjóðaði næstseinasta bólkinum, Tollarar og syndarar, á pallin, tá klokkan enn gekk móti eitt**

UMMÆLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Bárður á Lakjuni er oddamaður og forsangari í bólkinum. Hann er nokk mest kendur frá SALT, tað skuldi boða frá einari góðari rødd, og tað fingu øll, ið vóru í Keldusalinum í kvøld at hoyra.

Allir í bólkinum hava spælt heilt nógv. Hetta hoyrdist eisini aftur, tí teir spældu heilt væl.

Fyrsta lagið leiddi tankarnar í onkran møtisal, men tað gjørdu tey seinnu ikki, tí tá gjørdist alt eitt sindur meira alternativt og spennandi. Størsti vansin við tónleikinum eru vóru tekstirnir, sum kanska høvdu verið góðir til sunnudagsskúla ella møtir, men hetta var væl vigað upp við løgunum, sum onkuntíð vóru heilt fangandi og góð.

Eitt sum fekk T.O.S. at bróta frá hinum bólkunum, var at teir sungu bara á føroyskum. Tað er ein styrki, um ætlanin var at fáa ein boðskap út til fólkið í salinum. Til hetta hjálpti eisini at bólkurin á ongan hátt skammaðist av røddini hjá Bárði, sum altíð hoyrdist betur enn ljóðførini.

Oddamaðurin riggaði sum heild væl. Hann var fittur, sjarmerandi og ikki bangin av sær. Í útsjónd minti Bárður á Lakjuni eitt sindur um ein glaðan Petur Pólson, og tað er í hvussu so er ikki neiligt.

Á skránni hevði bólkurin eisini sangin »Gud er mín styrki og borg«, sum er kendur frá møtum kring landið. Fólkið tók sera væl ímóti variantinum hjá T.O.S. og satt at siga er fjøldin á Fjarðafestivalinum heilt víst tann, ið syngur vakrast av øllum festivalfjøldunum í Føroyum.

Bárður á Lakjuni skrivar tekstirnar í bólkinum, men fær heilt nógvan íblástur úr Sálmunum og Fjallaprædikuni í bíbliuni.



*Tollarar og syndarar skaptu ein serligt huglag við fangandi løgum sínum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*